# FRØÐI

2/2004 10. árg. kr. 48,00



Skelsandurin á Hvítanesi

Skjórutur springari og hvessingur verða kannaðir

Chaetopterus-bustmaðkar

Dustlús

## Kvinnur í Føroyingasøgu

# Ritstjórnargrein

**Náttúruni tørvar verju**

Í 1872 eydnaðist vælmeinandi fólki at fáa amerikansku kongressina at samtykja, at eitt 9.000 fermetur stórt øki í Rocky Mountains skuldi friðast, so náttúran har kundi varðveitast til komandi ættarlið.

Økið fekk navnið Yellowstone National Park, og tað er enn í dag ein av størstu og kendastu tjóðarparkunum í heiminum. Síðani hava lond kring allan heimin tikið stig til at friða bæði stór og smá landaøki, og sum oftast er hetta nakað, sum íbúgvar landsins eru bæði glaðir fyri og ikki minst ernir av.

Nú landsstýrið ætlar sær at gera meira fyri at verja umhvørvið, og ætlanirnar um at gera reyðlistar fyri føroysk djóra- og plantusløg eru komnar væl á veg, hevði tað verið eitt gott hugskot at friðað nøkur náttúruøki í Føroyum.

Hetta kundi t.d. verið onkur av teimum sjáldsomu støðunum, sum lívfrøðingar hava skrivað og framhaldandi fara at skriva um í Frøði. Í blaðnum hesaferð er ein grein um Hvítasand á Hvítanesi, og har verða økini við Eiðiskoll og Gróthúsvatn eisini nevnd sum støð, sum eiga at verjast. Alt ov stór líkasæla ræður, tá ið tað snýr seg um taðing og seyðabit, og eingin ivi er um, at tørvurin á at verja øki er stórur.

Friðing av náttúruøkjum í Føroyum hevði ikki einans kunnað vart øki fyri ymiskum ágangi, men kundi eisini styrkt áhugan hjá fólki at vitja slík støð og ment hugburð okkara at fara væl við náttúruperlum okkara.

*Góðan lestrarhug!*




**FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG GEVUR FRØÐI ÚT**

© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.
Frøði er alment vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Haldaragjald er kr. 84,- árliga.

Upplag 1300
ISSN 1395-0045

Loyvt er at endurgeva úr Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.

**AVGREIÐSLA**

Jarðfrøðisavnið
Brekkutún 1
Postsmoga 3169
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur:
frodi@jfs.fo

**RITSTUÐLAR**

Fiskirannsóknarstovan
Fróðskaparsetur Føroya
Føroya Forminnissavn
Føroya Landsbókasavn
Føroya Landsskjalasavn
Føroya Náttúrugripasavn
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfrøðisavnið

## RITSTJÓRN


Erling Isholm (Ábyrgd)


Lis Mortensen


Hans Joensen


Lena Reinert

## AVGREIÐSLA


Bjørg Svabo


Tina Ragnudóttir

**GRAFISK FRAMLEIÐSLA OG PRENT:**
Føroyaprent

**PERMA:**
*Áseymað veggtjald, sum Petra og Beata Petersen hava seymað. (Mynd: Haldane Joensen)*




# Innihald

2/2004


**4** ***Skelsandurin á Hvítanesi***
*Magnus Gaard og Janus Hansen, Føroya Náttúrugripasavn*

**9** ***Eiði í vísindaligum brennidepli …***
*Lis Mortensen, Jarðfrøðisavnið*

**10** ***Skjórutur springari og hvessingur verða kannaðir***
*Dorete Bloch og Bjarni Mikkelsen, Føroya Náttúrugripasavn*

**15** ***Fyri 200 árum síðan***
*Lis Mortensen, Jarðfrøðisavnið*

**16** ***Kvinnurnar í Føroyingasøgu***
*Marjun Arge Simonsen*

**24** ***Chaetopterus-bustmaðkar***
*Jógvan Fróði Hansen, Havlívfrøðiliga Roydarstøðin*

**30** ***Dustlús***
*Dorete Bloch, Føroya Náttúrugripasavn*

**32** ***Alis- og Evnafrøði 3***


# RITUMBOÐSRÁÐ


Anna Maria Fosaa
*plantuvistfrøðingur*


Sámal T. F. Johansen
*søgu- og landafrøðingur*


Elin S. Jacobsen
*søgufrøðingur*


Óluva Niclasen
*matvøruverkfrøðingur*


Símun V. Arge
*fornfrøðingur*


Gunnar Bjarnason
*búnaðarfrøðingur*


Eilif Gaard
*havlívfrøðingur*


Durita Joensen
*bókavørður*


**NÝGGIR HALDARAR**
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

**ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI**
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

**GREINIR TIL BLAÐIÐ**
Almennar, vísindarligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundsleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

**LÝSINGAR TIL FRØÐI**
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við ritstjórnina, telefon 315302 fjarsemil 322074 teldupostur: frodi@jfs.fo

**LÝSINGAPRÍSUR**

| | |
|---|---|
| Heil síða: | Kr. 5.000,- |
| Hálv síða: | Kr. 3.000,- |
| Triðingssíða: | Kr. 2.000,- |

**FRØÐILIGUR RÆTTLESTUR:**
Ritumboðsráðið
Turið Sigurðardóttir
Andras Mortensen
*Málslig ráðgeving:* Jóhan Hendrik W. Poulsen prof.
Rættlestur:
Marjun A. Simonsen

# Skelsandurin á Hvítanesi

*Úti á Hvítasandi á Hvítanesi er hvítur skelsandur. Staðarnøvnini Hvítanes og Hvítisandur koma uttan iva av hesum. Fjøran á Hvítanesi er avgjørt eitt av teimum støðunum í Føroyum, har ið tað eigur at verða fylgt væl við broytingum í náttúruni. Umstøðurnar á Hvítanesi eru sermerktar, og har ið ólivnu umstøðurnar eru sermerktar, er tað ofta soleiðis, at sjáldsom djóra- og plantusløg eru.*




**Magnus Gaard og Janus Hansen**
**Føroya Náttúrugripasavn**

*Mynd: Henry Berg*



**Hvat er í fjøruni?**

Sum heild er fjøran tað búøkið hjá livandi verum, ið hevur tað mest fjølbroytta plantu- og djóralívið. Tað er tó ikki so, at tað altíð eru fleiri ymisk sløg í fjøruni enn aðrastaðni, men hinvegin eru sera nógvir djóra- og plantubólkar umboðaðir. Fjøran er markið ímillum sjógv og land, og í fjøruni síggjast tískil bæði djóra- og plantubólkar, ið vit vanliga fata sum landdýr og landplantur umframt bólkar, ið vit vanliga fata sum sjódjór og sjóplantur. Oman ímóti sjóvarmálanum og niður á 20 metra dýpi vaksa stórtarararnir. Ein ørgrynna av dýrum og smærri tarum liva saman við stórtarunum. Dýrini nýta stórtaran at fjala seg í og festa seg á. Stórtarin kann eisini vera føðigrundarlagið hjá teimum. Oman fyri sjóvarmálan eru lívskorini eisini sermerkt. Fyri tað mesta er lendið niðri í fjøruni í Føroyum hella og sjóvarklettur, men summastaðni, har sum tað ikki er so ábært, kann vera møl ella sandur. Á berari hellu vaksa einans nøkur fá sløg av blómuplantum. Í mølini kunnu vaksa fleiri sløg av blómuplantum. Í víkini, har Hvítisandur er, er bæði møl, sandur og hella. Men serliga eyðkent fyri hesa fjøruna er smágrót við nógvum skeljabrotum í.

**Stórtarar**

Sermerkt fyri Hvítanes er, at á sjálvum nesinum eru fleiri víkir. Inni í teirri eystastu víkini er Hvítisandur. Sjálvt nesið uttan fyri Hvítasand er ábært, men tað er tó kyrrari inni í víkini. Nógvir støðuhyljar eru eisini á helluni fram við Hvítasandi. Samanumtikið hevur tað við sær, at tað eru nógv sløg av stórtarum her. Her eru bæði tey sløgini, sum eru vanlig í støðuhyljum, og tey sløgini, ið trívast á kyrru- og brimplássum. Innast í sjálvari víkini er mest av grøntarunum slýleggi *(Enteromorpha intestinalis)*, slýblaði *(Ulva lactuca)* og eisini slýtráði *(Cladophora rupestris)*.

Inni í víkini eru fleiri sløg úr bløðrutaraslektini (Fucus), og eisini bólatari *(Ascophyllum nodosum)*, ið einans veksur á kyrruplássum. Úti á Nesi og longri úti frá sjóvarmálanum eru sløgini tarablað *(Laminaria digitata)* og tonglatari *(Laminaria hyperborea)* ráðandi. Einans tey vanligastu tarasløgini verða nevnd her. Umframt hesi sløg eru fleiri onnur meir og minni sjáldsom sløg.



*Mynd: Henry Berg*



*Sævarrossatunga*
*Mynd: Magnus Gaard*



*Sævargøtubrá*
*Mynd: Jóhannes Jóhansen*

**Blómuplantur**

Fjørugróðurin í Føroyum er ikki fjølbroyttur. Fyri tað mesta er ber hella oman ímóti sjóvarmálanum. Á berari hellu trívast bert fá sløg av blómuplantum. Tey kunnu festa seg í eina sprungu ella í eitt hol, har sandur ella smágrót er savnað. Best kendar eru sævargøtubrá *(Plantago maritima),* sjógras *(Armeria maritima)* og læknaeirisgras *(Cochlearia officinalis);* allar hesar plantur eru á Hvítanesi. Í mølini og serliga mølini við smágróti og skeljabrotum er ríkiligt av kálki og betri møguleikar hjá plantum at festa seg í undirlendið. Á Hvítanesi veksur gásamura *(Potentilla anserina)* í mongd, fjørurímbløðka *(Atriplex glabriuscula)* er vælumboðað, og heldur sjáldsamari er sand-

*Slýleggur*
*Mynd: Magnus Gaard*



dunnuber *(Honckenya peploides)*. Bæði kollut baldursblóma *(Chamomilla suaveolens)* og hálshvít baldursbrá *(Matricaria maritima)* vaksa eisini í hesum lendinum á Hvítanesi. Harumframt eru heilt sjáldsamar plantur her. Tær eru sævarrossatunga *(Mertensia maritima)* og krøkin steinbrá *(Galium aparine)*. Tá ið vit koma niðan í sjálvan bakkan, broytist gróðurin almikið. Men eisini her er gróðurin merktur av, at hann er so nær sjónum. Á Hvítanesi veksur bæði hvonn *(Angelica archangelica)*, sløkja *(Angelica silvestris)* og hjálpirót *(Rhodiola rosacea)* í bakkanum.

**Skordýr**

Ikki eru skordýrini á Hvítanesi nógv kannað. Tó einstakar skrásetingar eru, og tær eru ikki sørt áhugaverdar. Í summar varð ein lítil reydlig klukka í svartaklukkuættini funnin í skelsandinum, *Trechus fulvus*. Hetta var onnur funnin síðan 1937. Eisini ein klukka í slektini Bembidion varð funnin har, og er hon tann fyrsta í hesari slektini, sum er skrásett síðan 1937.

Ein bólkur av skordýrum er nevndur hoppstertur (Collembola). Hetta eru smáar verur, sum tú sært nærum allastaðni í náttúruni, um bara tú veitst, hvussu tær síggja út. Í fjøruni kunnu hesar verur gerast so nógvar í tali, at tær liggja sum eitt lag á støðuhyljum, ella í hylinum, sum kemur í, tá ið tú vendir einum steini. Í summar tók serfrøðingurin Arne Fjellberg tvey sýni á Hvítanesi. Hann fann 11 sløg; 4 av teimum eru sløg, sum ikki eru skrásett í Føroyum áður, *Friesea truncata, Folsomia norvegica, Parisotoma agrelli, Isotomurus fucicolus.*

At síggja til eru annars tey sløgini, ið tú vanliga sært í fjøruni, at finna á Hvítanesi, t.e. marflugur, kongalýs, grátt undir steini o.s.fr.



*Hoppstertan*
Isotomura fucicolus
*Mynd: Antonio Cavapelli*

**Fuglar**

Gongur tú tær ein túr út á Hvítasand á sumri, kanst tú vera vísur í ofta at gerast skakkur av mýrisnípum, tá ið tær við einum hvøllum láti skjótast upp úr einum blota. Hellan, ið ber navnið Æðuhellan, kann ikki sigast annað enn



*Grágrælingur*
*Mynd: Janus Hansen*



*Mýrisnípa*
*Mynd: Janus Hansen*

at bera rætt navn, tí sera ofta liggja æður á hesum tanga ella svimja útfyri.

Á sumri gera ternurnar, sum halda til har á leiðini, ikki minst um seg, og hóast illsintar eru tær ein hugnaligur partur av umhvørvinum. Grælingur, svarthálsur og stelkur eru ofta at síggja.

**Friðing uttan tarn**

Tað er sera umráðandi, at friðingarmyndugleikar í framtíðini hava lívfrøðiligt margfeldi í huga, tá ið øki skulu friðast. Fyri at varðveita lívfrøðiligt margfeldi er eisini sera týdningarmikið at friða miðvíst og ikki einans frá einum ítøkiligum friðingarmáli til tað næsta. Um tað verður friðað miðvíst, verður tað jú ikki friðað fyri ávíst inntriv, men einans tí, at ávís øki eru verd at varðveita. Orsakirnar til, at øki eru verd at varðveita, kunnu vera fleiri, men ein orsøk er heilt avgjørt lívfrøðiliga margfeldið. Vit hava skyldu til at varðveita lívfrøðiligt margfeldi, og í fyrstu atløgu ber til at friða smá øki í Føroyum, har ið nógv sjáldsom sløg eru.

Tað mesta av haganum í Føroyum er rættiliga einsháttað, og tí er hann sum heild eisini búøki hjá somu djóra- og plantusløgum. Summi øki víkja tó rættiliga nógv frá vanliga lendinum í Føroyum. Tey eru búøki hjá eini rúgvu av sløgum, bæði plantu-, dýra- og soppasløgum, ið annars eru sera sjáldsom her á landi. Á onkrum av hesum økjum eru lívverur enntá í vanda fyri at hvørva, um vit ikki bera okkum rætt at. Hesi øki eiga vit at friða og varðveita beinanvegin, og átti tað at kunna verið gjørt uttan stórvegis tarn. Fleiri av hesum økjum hava lítið og einki landbúnaðarligt virði, og ein skipað friðing hevði tí kunna verið framd, uttan at nakar var fyri missi. Saman við Eiðiskolli og økinum við Gróthúsvatn á Sandi, ið eru viðgjørd í undanfarnum bløðum, er fjøran á Hvítanesi heilt avgjørt eitt av hesum støðum. Hetta er eitt sjáldsamt búøki í Føroyum. Í londunum uttan um okkum er hetta búøkið í minking og er tí umfatað av m.a. "Habitatdirektivinum" hjá ES. Serliga eigur at verða lagt til merkis, at hetta er einasta rættiliga góða vakstrarstaðið hjá sævarrossatungu í Føroyum. Sævarrossatunga er ikki einans sjáldsom í Føroyum, men hon er eisini á reyðlistanum fyri hótt plantusløg í fleiri av okkara grannalondum.


**Heimildir:**

Bengtson, S.-A. 1981: Terrestrial invertebrates of the Faroe Islands: III Beetles (Coleoptera): check-list, distribution, and habitats. Fauna Norvegica Series B 28 52-82.

Mohr, J.1974: Lív og lutir. Frásagnir úr Hoyvík og av Hvítanesi. Egið forlag, Hoyvík.

Plantusavnið hjá Føroya Náttúrugripasavni



**Janus Hansen**

er útbúgvin Master í lívfrøði við Universitetið í Lund. Serritgerð um vatnklukkur í Føroyum. Hann arbeiðir á Náttúrugripasavninum við skráseting av lívfrøðiligum margfeldi og reyðlistum.

Teldupostur: Jamish@nsg.fo

**Magnus Gaard**

er útbúgvin cand.scient. í lívfrøði við Keypmannahavnar Universitet. Undirvísir á Studentaskúlanum í Hoydølum. Arbeiðir harumframt á Náttúrugripasavninum við lívfrøðiligum margfeldi og reyðlistum.

Teldupostur: magnusgh@nsg.fo

# Eiði í vísindaligum brennidepli í 19. øld

*Í dag tosa vit um, at ístíðir hava verið og kunnu koma aftur. Fyri 200 árum síðan var henda vitanin um ístíðir enn ikki kend, og tað var um hesa tíðina, at Eiði gjørdist áhugaverd bygd fyri vísindini í Evropa.*



LIS MORTENSEN
JARÐFRØÐISAVNIÐ



Í 1812 vitjaðu tveir jarðfrøðingar í Føroyum, Mackenzie og Allan. Teir komu til Føroya at leita eftir jarðfrøðiligum fyribrigdum, sum teir høvdu funnið í Íslandi. Teir leitaðu eftir prógvum um, at Føroyar vóru bygdar upp av eldgosum eins og Ísland. Allarhelst funnu teir nakað av tí, sum teir leitaðu eftir, men teir funnu meir enn tað. Á vitjan teirra á Eiði legði Allan merki til nakað løgið. Teir gingu á helluni norðan fyri bygdina, nakað oman fyri vatnið, og undraðust á, at kletturin har hevði eitt so sermerkt skap við longum brýndum foyrum. Allan skrivaði í dagbók sína, at hellan bar brá av at hava verið niðurslitin av einum stórum, tungum likami.

Eygleiðingarnar hjá Allan vórðu prentaðar í grein í Edinburgh, nógv ár áðrenn prátið um fornu ístíðirnar rættiliga vant upp á seg. Hvørki Allan ella Mackenzie funnu nakra skilagóða frágreiðing til brýndu helluna, og teir máttu lata spurningin standa ósvaraðan til komandi jarðfrøðingar.

Tað gingu næstan 70 ár, áðrenn spurningurin hjá Allan varð svaraður. Í 1879 vitjaðu nevnliga tveir aðrir jarðfrøðingar, Geikie og Helland, aftur helluna á Eiði, og teir kundu leggja kanningarnar av rundleiddu helluni á Eiði fram í harða kjakið sum eina av prógvførslunum fyri, at ístíðir hava verið. Kanningar teirra vístu, at Eiðisøkið hevur verið hult undir jøklum. Lendið undir jøklunum var máað niður, og summastaðni, m.a. á helluni norðan fyri Eiðisbygd, varð hellan brýnd rundleitt av vatni undir tunga ísinum.

Á henda hátt gjørdist hellan á Eiði partur í vísindaliga putlispælinum, sum lýsir, hvussu jørðin hevur verið fyri afturvendandi ístíðum og millumístíðum seinastu 2-3 milliónir árini.

**Kelda:**
Jóannes Rasmussen (1963): Recent studies on the geology of the Faeroes. North Atlantic Biota and their history.

**LIS MORTENSEN**

er útbúgvin cand.scient í náttúrulandafrøði á Geografisk Institut, Københavns Universitet, í 1990. Síðan tá hevur hon starvast á Jarðfrøðisavninum

Teldupostur: lismor@jfs.fo



# Skjórutur springari og hvessingur verða kannaðir





DORETE BLOCH OG BJARNI MIKKELSEN
FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN

**Náttúrugripasavnið kannar smáhval**

Eftir áheitan fra NAMMCO - Norðuratlantssamstarvinum um kóp og hval - kannar Náttúrugripasavnið hesi árini lívfrøðina hjá skjórutum springarum og hvessingum.

Í § 2 í Kunngerð um undantak fyri friðing av hvali, nr. 19 frá 1. mars 1996,[7] stendur:

Tað er loyvt at taka hesi hvalasløg:

1) Grindahvalur *(Globicephala melas)*
2) Hvessingur *(Tursiops truncatus)*
3) Kjafthvítur springari *(Lagenorhynchus albirostris)*
4) Skjórutur springari *(Lagenorhynchus acutus)*.

Í Føroyum hava so statt hvessingur og skjórutur spingari altíð lagt beinini eins og grind. Náttúrugripasavnið hevur veiðutøl aftur til 1803 fyri 980 hvessingar og aftur til 1872 fyri 8.329 skjórutar springarar.[4] Veiðan hevur helst verið meira umfatandi, men er ikki tikin við í hvalahagtølini. Ikki minst fyri skjórutar springarar hevur hetta verið galdandi, tí jarðarhvalur og tíggjund skuldu ikki gjaldast av hesum slagnum.

Tá ið hesi smáhvalasløg óregluliga leggja beinini her, hava vit ein møguleika at kanna lívfrøðina nágreiniliga. Aðrastaðni er tað bert møguligt, tá ið hvalirnir gera landgongd, og tí er lítið skrivligt tilfar til um evnið.

**Bæði skjórutur springari og hvessingur eru springarar**

Hvalir verða skiftir í barduhvalir og tannhvalir. Skjórutur springari og hvessingur eru tannhvalir. Tannhvalir verða skiftir í 9 ættir, og ein av teimum fatar um springarar. Til hesa ætt hoyrir okkara vanligi skjóruti springari og hvessingur eins og grindahvalur og mastrarhvalur, ið er hin størsti í hesi ætt.[1]

Allir springarar eru minni hvalir, ið hava 8-40 tenn hvørjumegin bæði í undir- og yvirkjaftinum. Tenninar eru 1-8 cm langar.[1]



**Hvussu sær skjórutur springari út?**

Skjórutur springari er dimmgráur á bakinum og ljósur undir búkinum og hevur stórt horn. Hann er eyðkendur fyri at hava eina morgula rípu eftir allari líðini og eina svarta, ofta tvíbýtta rípu úr kinnklovanum út á røðina á bøkslinum.[1] Kallhvalurin verður størri enn kvennhvalurin. Kallhvalirnir av skjórutum springara, ið hava lagt beinini í Føroyum, hava mátað 100-274 cm, vigað 32-236 kg og verið 0-22 ár gamlir, og kvennhvalirnir hava mátað 106-260 cm, vigað 24-104 kg og verið 0-27 ár gamlir.[5]



**Hvussu sær hvessingur út?**

Hvessingur er við hvørt uppi í grind og verður í stødd upp til ein 3-skins grindahval. Hvessingurin er meira kýpin og er dimmgráur allur sum hann er uttan undir búkinum, har hann er ljósari. Trónurin er stuttur, og hornið meira tríhyrnt enn á grindahvali.[1] Eins og fyri skjórutan springara verður kallhvalurin hjá hvessingum longri enn kvennhvalurin. Hvessingarnir, ið hava lagt beinini í Føroyum, hava mátað 143-337 cm og vigað 92-354 kg.[1,3]

**Hvar eru teir?**

Skjórutur springari er ein pelagiskur hvalur og livir í tí flógva partinum í Norðurhøvum. Skjórutur springari er vestarumegin í Norðurhøvum úr Vesturgrønlandi til Chesapeak Bight í Marylandi og eystarumegin úr Barentshavi til Asorurnar og heilt inn í Adriahav.[1,6]

Hvessingur fer so langt norðureftir sum til strendur Grønlands. Hann er kring knøttin allan bæði í flógvum sjógvi og í tropiskum sjógvi. Ein bólkur heldur til fram við strendurnar næst hjá okkum við Eysturskotland. Ein annar bólkur er pelagiskur, og er tað hann, ið kemur henda vegin.[1,6]

*Útbreiðsla hjá skjórutum springara. Mynd: GEM-frágreiðingin*









*Útbreiðsla hjá hvessingi*
*Mynd: GEM-frágreiðingin*

**Hvussu verður kannað - hvørji sýni verða tikin?**

Tá ið Føroya Náttúrugripasavn tekur sýni av hvalunum, verður tað gjørt eins og við grindakanningini frá 1986-1988. Metingarmenninir máta fulla longd í cm frá tróninum til skarðið í sveivini, og samstundis kanna teir eisini kynið á hvalinum. Her er savnað tilfar frá 19 hvessingum og 2.822 skjórutum springarum.

Skjórutir springarar leggja oftari beinini enn hvessingar og oftast einsamallir uttan at vera í eini grind. Afturímóti eru oftast nakrir fáir hvessingar uppi í eini grind, og fáa vit tá ikki boðini fyrr enn aftaná. Tí hevur tað víst seg at vera sera ringt at savna nóg nógv tilfar saman um hvessing í mun til skjórutan springara.

Tá ið tað liggur fyri, verða hvalirnir vigaðir heilir, og hava vit í dag vektina av 3 hvessingum og av heili 302 skjórutum springarum.

Fyri at aldursgreina hvalirnar verður undirkjafturin høgdur av við eini øks. Tenninar verða brúktar til aldursgreining.

Kynsgøgnini verða tikin út fyri at kanna, um hvalirnir er kynsbúnir og hvussu nógvar hvølpar, teir kynsbúnu kvennhvalirnir hava lagt. Tað verður eisini hugt at, um kvennhvalirnir eru kvidnir og/ella mjólka.

Kíkar verða savnaðir fyri at kanna, hvat hvalirnir hava etið.

Sýni av tvøsti, spiki, livur, nýra og hjarta verða savnað og varðveitt fyri seinni at kanna møguligan skyldskap í bólkinum og eisini kanna, hvussu dálkaðir hvalirnir eru. Hesar kanningar kunnu ikki gerast í Føroyum og eru sera kostnaðarmiklar.

At enda verður hugt at, hvørjir snúltarar finnast, bæði uttan á hvalunum, millum spik og tvøst, og eisini í og millum innvølin.

Eru stundir til tess, áðrenn hvalirnir skulu skerast upp, verður eisini mát tikið av spiktjúktini fyri at kanna, hvussu væl hvalirnir eru fyri gjøgnum árið. Eisini verða ymisk mát uttan á hvalunum tikin at bera saman við hvalir aðrastaðni.

**Fyribils kanning vísir skyldskap**

Sum høvuðsuppgáva hevur verið kannað, um skyldskapur var í einum bólki av skjórutum springarum og millum skjórutar springarar her og aðrastaðni.[8] Tilfar frá skjórutum springarum, ið høvdu gjørt landgongd í Skotlandi, sum varð borið saman við tilfari frá springarum her, vístu ongan mun millum djórini hesi støðini. Einasti skyldskapur í einum flokki er helst millum móður og hvølp.[8]

### Hvør av øðrum liva má

Hesi árini verður nógv arbeiði lagt í at greina føðinetið í havinum kring okkum, bæði á Fiskirannsóknarstovuni og í NAMMCO-høpi. Springarar standa ovast í føðiketuni, men fyri at vita, hvussu stóran týdning teir hava í øllum føðinetinum, er neyðugt at vita, hvat og hvussu nógv teir eta, umframt hvussu nógvir hvalir eru um okkara leiðir gjøgnum árið. Í roknistykkinum verður eitt tal nýtt fyri vektina á einum miðalhvali. Tað er nógv lættari at máta longdina enn at viga heilar hvalir, men er sambandið millum longd og vekt roknað út, slepst lættari. Hetta er orsøkin til, at vit eru so áhugað í at fáa tikið longd og vekt á so nógvum hvalum sum møguligt.

Vit hava ein álítandi frymil fyri sambandið millum longd (L) og vekt (W) hjá skjórutum springarum:[3]

W = -13.902 + 0.00056884 * L ^ 2.321

og ein fyribilsfrymil fyri hvessingar, ið verður bøttur um, so hvørt sum vit fáa vigað fleiri hvessingar:

W = 0,0383 * L ^ 1,569

Fyribilskanningar av føðini hjá skjórutum springarum vísa, at hann etur mest svartkjaft og hvítingsbróður, men eisini gulllaks.[9]

### Eitt skinn av springara

Á grindaplássunum verður ofta spurt um, hvussu nógv eitt skinn av springara vigar. Upprunin og søgan aftan fyri skinnatalið og málið er viðgjørt fyrr í bæði Frøði og Fróðskaparritum,[2, 10, 11] men sera leysliga kann sigast, at eitt skinn af springara vigar helvtina av einum grindaskinni, og eitt døglingaskinn vigar tað dupulta av grindaskinninum, sum í miðal er 72 kg, 34 kg av spiki og 38 kg av tvøsti.[2]

### Ósvaraðir spurningar, ið standa eftir

Hóast tilfar vantar um hvessing, eru eisini fleiri spurningar enn ósvaraðir viðvíkjandi skjórutum springara.

Vit vita ikki, hvussu skjórutir springarar brúka landgrunnin gjøgnum ári og um samband er við hvalirnar sunnanfyri, so sum skyldskaparkanningin bendir á. Ein góður máti at kanna hetta er at seta fylgisveinasendarar á nakrar skjórutar springarar.

Eitt annað er, at ein bólkur av skjórutum springarum vísir seg at vera heilt øðrvísi samansettur enn ein grind, ið er sammensett av skyldum kvenngrindahvalum við avkomi av báðum kynum og í øllum aldri. Hjá skjórutum springarum hava vit ikki funnið ein einasta kvidnan kvennfisk ella tann leiðandi kallfiskin. Samstundis er bólkurin við hvalum, sum eru kynsbúnir, heldur ikki funnin.






**Bókmentir**

1 Bloch, D. 1999. Villini Súgdýr í Útnorðri. Føroya Skúlabókagrunnur. 216 pp.

2 Bloch, D. 2003. Hvussu nógv vigar eitt skinn av grind? Frøði 1/2003: 4-8.

3 Bloch, D. and Mikkelsen, B. 2000. Preliminary estimates on seasonal abundance and food consumption of Marine Mammals in Faroese Waters. NAMMCO WG on Marine Mammal and fisheries interactions. Copenhagen 17-18 February 2000. SC/8/EC/7: 1-16.

4 Bloch, D. and Mikkelsen, B. 2003. Catch history and distribution of White-sided dolphin, *Lagenorhynchus acutus,* in the Faroe Islands. North Atlantic Marine Mammal Commission SC/11/16: 1-10.

5 Bloch, D. and Mikkelsen, B. 2003. Age and growth parameters of White-sided dolphin, *Lagenorhynchus acutus,* in the Faroe Islands. North Atlantic Marine Mammal Commission SC/11/18: 1-19.

6 Bloch, D., Mikkelsen, B. and Ofstad, L.H. 2001. Marine Mammals in Faroese Waters with special attention to the south-south-eastern Sector of the region. GEM Report to Environmental Impact Assessment Programme: 1-40.

7 Føroya Landsstýri. 2000. Hvalir og grind. Hvat sigur lógin? Eitt kunngerðar- og lógarsavn.

8 Jacobsen, Á., Andersen, L.W., Bloch, D. and Mikkelsen, B. 2003. A genetic analysis of *Lagenorhynchus acutus.* North Atlantic Marine Mammal Commission SC/11/19: 1-4.

9 Mikkelsen, B. and Bloch, D. 2003. A first note on the diet of white-sided dolphin *(Lagenorhynchus acutus)* in the Faroe Islands. North Atlantic Marine Mammal Commission SC/11/16: 1-6.

10 Thorsteinsson, A. 1993. Merkur, alin og gyllin - gomul føroysk virðismeting. Frøði 1: 4-9.

11 Thorsteinsson, A. 1996. Grindaprísur og skinnatal 1584-1638. Fróðskaparrit 44: 57-77.


*Myndirnar eru út bókini „Villini súgdjór í Útnorðri"*

## Dorete Bloch

tók náttúruvísindaligt embætisprógv í djórafrøði við serligum atliti at vistfrøði antarfuglanna 1970 við Aarhus Universitet. Hon gjørdist fyristøðari á Djóradeildini á Náttúrugripasavninum í 1980 og stjóri á Náttúrugripasavninum í 1997. Í 1994 fekk hon doktaraheitið fil.dr. í djóravistfrøði við grindahvalum sum evni við Lunds Universitet. Dorete hevur harumframt síðan 1974 verið lektari í lívfrøði á Fróðskaparsetri Føroya, og í 2001 fekk hon professaratign á sama stovni.


Teldupostur: doreteb@ngs.fo


## Bjarni Mikkelsen

er útbúgvin cand. scient. í lívfrøði frá Universitetinum í Tromsø í 1998. Hann starvaðist sum fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni frá 1998 til 2001. Síðan 2001 hevur hann starvast sum djórafrøðingur á Náttúrugripasavninum, har starvsøkið hansara er havsúgdjór (hvalur og kópur).


Teldupostur: bjarnim@ngs.fo

# FYRI 200 ÁRUM SÍÐAN

*Pyramiduspíski stabbin hjá danska prinsinum*



Eitt vanligt føroyskt grótpetti gjørdist í 1794 miðdepil í eini trætu við universitetið í Keypmannahavn um upprunan til basalt. Henda hugtakandi søgan knýtir seg til eitt grótstykki, sum er skapað sum ein pyramiduspískur stabbi, nakað avlangur og umleið 20 cm til longdar. Grótluturin varð sendur úr Føroyum í 1780-unum av Born kapteini til steinasavnið hjá arvaprinsi Fríðriki á Christiansborg slotti.

Í hesum árum vóru vísindafólk ósamd um upprunan til basalt. Kjakið var grundleggjandi eitt stríð millum tveir bólkar av vísindafólkum: neptunistar og vulkanistar.

Neptunistar høvdu ta fatan, at basalt var vorðið til úr vatni, meðan vulkanistar hildu upp á, at basalt vóru storknaðar grótbræðingar aftan á eldgos.

Í 1794 skipaði náttúrusøgufelagið í Keypmannahavn fyri fyrilestri um upprunan til basalt, har rithøvundurin Tyge Rothe við føroyska basaltstykkinum úr savninum hjá prinsinum royndi at sannføra áhoyrarar sínar um, at pyramiduspíski stabbin var prógv um, at basalt var krystalliskt grótslag. Hóast tað neyvan eydnaðist Rothe hetta kvøldið at sannføra allar áhoyrararnar um, at basalt er gosgrýti, vita vit í dag, at Rothe hevði grein í sínum máli.

Fýra vikur aftan á minniríka kvøldið í náttúrusøgufelagnum kom eldur í Christiansborg Slot, og rúgvismikla steinasavnið fór fyri skeytið. Tað vísti seg seinni, at tiltikni pyramiduspíski stabbin úr Føroyum varð bjargaður undan eldinum. Helst hevði Rothe enn ikki latið grótið innaftur til prinsin aftan á fyrilesturin.

Forkunnugi grótluturin, sum dróg Føroyar upp í beiska stríðið millum vísindaligu fylkingarnar, neptunistar og vulkanistar, er í dag í goymslunum á danska jarðfrøðisavninum, Geologisk Museum í Keypmannahavn.

## Heimild

Gunni Jørgensen (1977) Om pyramidalsk tilspidsede basaltstøtter fra Geologisk Museums samlinger. Dansk geologisk Forening, Årsskrift for 1976, side 29 – 32. København 3. januar 1977.

# Kvinnurnar í Føroyingasøgu

*Føroyingasøga er - eins og íslendingasøgur - skaldskapur, sum sigur frá hendingum, ið eru farnar fram tvær, tríggjar ella fýra øldir frammanundan, at søgan er niðurskrivað. Óivað hava høvundarnir verið ávirkaðir av síni egnu tíð og umhvørvi og sjálvsagt eisini av tí bókmentaliga ráki, ið hevur verið frammi tá. Kunnu hesar søgur so siga okkum nakað um veruligu kvinnurnar, ið livdu í víkingatíð?*

**Myndir:** Haldane Joensen





**Marjun Arge Simonsen**

Føroyingasøga er elsta og einasta heimild um søgu føroyinga í víkingaøld. Hon fevnir um tíðarskeiðið frá landnámi o.u. 800 til o.u. 1050, og mett verður, at hon er skrivað í Íslandi um 1200. Hóast hon má metast sum skaldskapur, so nýta søgufrøðingar hana lutvíst sum søguligt grundarlag. Føroyingasøga snýr seg í høvuðsheitum um kristningina av Føroyum, og hvussu Føroyar komu undir norskt vald. Í hesi grein fari eg at siga eitt sindur um kvinnurnar í Føroyingasøgu, hvønn týdning tær hava fyri søgugongdina, og um kvinnulýsingarnar kunnu siga okkum nakað um kvinnurnar, ið livdu tá á døgum.





**Tekstslag**

Føroyingasøga er serstøk í listarligari dygd, og hevur hon síni serligu eyðkenni, men bókmentasøguliga er ikki gjørligt greidliga at bólka hana annaðhvørt sum íslendingasøgu ella sum kongasøgu. Hon verður mett at liggja miðskeiðis millum hesi bæði tekstsløg. Føroyingasøga sigur nógv frá norskum jallum og kongum - Hákuni jalli, Ólavi Trygvasyni og Ólavi Haraldssyni - men kortini snýr hon seg í høvuðsheitum um stríð millum høvdingar; tískil hevur hon eisini nógvan líkskap við íslendingasøgur, ið snúgva seg fyrst og fremst um ættarstríð. Til dømis sum í Njáls søgu, Laxdøla søgu og Eyrbyggja søgu.

**Kvinnurnar í Føroyingasøgu**

Tær kvinnur, ið verða umrøddar í Føroyingasøgu, eru: Eyð hin Djúphugaða (ættmóðir gøtuskeggja), Guðrun (kona Torbjarnar gøtuskegg, móðir Tróndar), Guðrið (kona Havgríms), Cecilia (frilla Brestis), Tóra (frilla Beinis), Ragnhild (kona Úlvs, móðir Turiðar), Turið (kona Sigmunds), Íðun (móðir Ragnhildar), Torgerð Hørðabrúður (heiðin kvinna, ið Hákun fekk ringin frá, ið hann gav Sigmundi), Tóra (dóttir Sigmunds), Birna (kona Tórhals, giftist seinni við Sjúrði Tollakssyni), Alfíva (móðir Sveins kongs), Guðrun (dóttir Tróndar í Gøtu), Torbera (kona Torvalds, giftist seinni við Geyta reyða). Harumframt verða einstakar ónevndar kvinnur umrøddar, t.d. móðir Ólavs Trygvasonar.

**Tóra og Turið**

Kvinnuskepnurnar í Føroyingasøgu eru ikki serliga sjónskar, men hava tó í støðum stóran týdning fyri hendingagongdina. Tær, ið hava størstan leiklut í søguni, eru megnarkvinnurnar, Turið megineinkja, ið er eitt satt konubrot, og dóttirin, sum í snildleika og viti ikki stendur aftan fyri sjálvan Gøtu-Trónd.

Tóra verður lýst sum ein áhugaverd persónmenska. Greitt verður frá henni á henda hátt: „Hesi vóru børn hjá Sigmundi og Turið: Tóra, dóttir teirra, var elst, hon var fødd á fjallinum. Hon var stór og manslig og ikki serstaka vøkur; tað tókti øllum longu á ungum aldri, at hon fór at vera vitug …“ (bls. 82). Hon er sostatt ikki serliga vøkur, men hon er klók. Tað óvanliga við henni er, at hon hevur ongan vakurleika, ið kann vera henni til nyttu. Men Tóra er tann einasti persónurin í Føroyingasøgu, ið kann sigra yvir Tróndi, - tí hon er eins klók og sterk sum Tróndur. Tað kemur greidliga til sjóndar, tá ið hon játtar Tróndi at fostra son sín Sigmund. Tá ið Tróndur býður Leivi barnfostur, svarar Leivur, at fyri barnfostrinum skal Tóra ráða. Hetta sýnir, at Leivur hevur virðing fyri konu síni, og Tóra er gløgg, - hon sær Trónd sum ein virðiligan mótstøðumann, og er hon sinnað til at lata Trónd fostra sonin ... „tí nógv, tykir mær, Tróndur hevur fram um aðrar menn“ sigur hon (bls. 119). Tá ið Tróndur fekk son teirra til fosturs, læt hann dreingin sova hjá sær um náttina. Hetta vardi hann móti tí hevnd, ið hann væntaði, at Tóra hevði ætlanir um. Men tá ið møðgurnar gera seg til reiðar at hevna dráp Leivs Tórissonar, megnar Tóra at fáa dreingin aftur frá Tróndi frammanundan, so hann ikki verður fyri meini. Eyðsæð er, at í henni hevur Tróndur funnið sín yvirmann.



Turið húsfrú verður lýst sum ein sterk og djørv kvinna, eitt nú á bls. 89-90, tá ið Tróndur kemur til garðin, og hon tekur vápn í hond eins og maður: „teir Sigmundur leypa skjótt til vápnini, allir sum har vóru. Turið húsfrúin tekur til vápna og er ikki minni dugandi enn ein og hvør kallmaður.“ Hetta er avgjørt ein positiv lýsing, at hon tekur til vápna og ber seg

sum ein maður, sjálvt um kvinnur ikki høvdu loyvi at bera vápn tá á døgum. Søgan heldur fram, og Sigmundur doyr, og her verður Turið umrødd við stórari virðing: „Turið húsfrú, ið síðan var kallað megineinkja, sat á búgvi sínum í Skúvoy eftir Sigmund húsbónda sín. Har vuksu upp børn teirra, og vóru tey øll evnalig“ (bls. 95). Heitið Turið megineinkja, ið merkir 'tann mikla einkjan', sýnir hennara stórleika. Bo Almqvist sigur um lýsingina av Turið og Tóru í innganginum til Färingasagan: „Med inträngande psykologisk skarpblick är också sagans storvulna och dådkraftiga kvinnogestalter tecknade“ (bls. 56).



**Aðrar kvinnur**

Tvær kvinnur, ið vit ikki fáa nógvar upplýsingar um, eru Cecilia og Tóra, ið vóru frillur hjá ávikavist Bresti og Beini. At vera frilla var ein viðurkend støða hjá kvinnum. Henda støða hevur verið nakað lægri enn hjá giftum kvinnum, men frillurnar vóru ikki ósjónligar ella fjaldar í samfelagnum. Eisini í íslendingasøgum hava frillur hesa støðu. Hesar kvinnur hava somuleiðis eina viðurkenda støðu í samfelagnum.



Um Ceciliu verður upplýst, at hon er norrøn av ætt. Orsøkin til, at tað verður nevnt, er, at navnið Cecilia er ónorrønt navn, og tað er forvitnisligt í sjálvum sær. Cecilia er halgimennisnavn, ið hevur verið sera væl umtókt sum kvinnunavn í kristnari tíð. Jóhan Hendrik W. Poulsen sigur í grein síni *Fólkanøvn í Føroyum*, at navnið Cecilia í Føroyingasøgu er elsta dømið um hetta navn í Norðurlondum. Eisini sigur hann, at navnið kann vera komið úr kristnum landi sunnan um hav. Kundi hetta bent á kristindóm í Skúvoy, ið hevur verið undan kristindóminum, ið Sigmundur boðaði? Hesin kristindómur *kann* vera komin sunnan úr keltiskum londum fyri ár 1000. Navnið á Gilla løgmanni bendir eisini tann vegin. Gilli er keltiskt navn; tað er eisini kristið navn, og tað merkir 'tænari (Krists)'. Ein onnur hugsan kundi sjálvandi verið, at høvundurin hevur verið ávirkaður av síni samtíð og teimum nøvnum, ið vórðu nýtt, tá ið hann festi søguna á blað.



Frilla Beinis ber navnið Tóra, ið er drigið av navninum hjá Tóri, ið var heidni høvuðsguðurin. Somuleiðis er við nøvnunum Turið, Torgerð og Torbera.

Eisini er at nevna dóttur Tróndar uttan fyri hjúnalag. Hon er nevnd Guðrun, og eftir umrøðuni at døma er hon viðurkend sum dóttir hansara. Guðrun verður bert einaferð nevnd (bls. 120) í sambandi við, at sagt verður frá, at Tróndur var ikki giftur maður. Guðrun kemur síðan ikki fyri aftur í søguni.



Brotið um Torgerð Hørðabrúður er sera forvitnisligt. Torgerð er heiðin kvinna, møguliga

prestinna, ið fær stóra virðing frá Hákuni jalli. Hann sigur seg hava sett alla trúgv sína til hennara. Í hovinum blakar hann seg niður fyri føtur hennara, enntá tvær reisir, hetta til at hon skal geva Sigmundi ringin, ið hon hevur á arminum. At enda fær hann ringin og gevur Sigmundi hann. „Jallurin fær Sigmundi ringin og mælti so, at henda ring skuldi Sigmundur aldri skiljast við, og tað lovaði hann" (bls. 56). Hetta er byrjanin til tað, ið til síðst gjørdi enda á Sigmundi Brestissyni. Sigmundur doyði, tí Torgrímur illi var so grammur eftir gullringinum, at hann tók lívið av Sigmundi. Eisini gjørdist Ólavur kongur vreiður inn á Sigmund, tí hann vildi ikki lata honum ringin. Summir granskarar vilja vera við, at ringurin verður til vanlukku fyri Sigmund, tí hann fekk hann frá Hákuni jalli, ið var heiðin. Ringurin umboðar klovningin, ið kemur í, tá ið Sigmundur skiftir trúgv. Hann missir vinir sínar, ið hann hevði, áðrenn hann tók við kristnari trúgv. Ringurin er sostatt eitt vannlukkutekin, tí av honum fann Sigmundur sín bana.

Í Føroyingasøgu finna vit eisini ábendingar um, hvussu ymisliga støðu kvinnurnar høvdu í hjúnalagnum. Eitt nú er eitt dømi um, hvussu kvinna kann skúgva húsbónda sín til viks, so at hon sleppur at ráða í øllum heima. Tað verður sagt um Birnu, ið var gift við tí gamla Tórhalli, at hon varð givin honum fyri ríkidømi. Tað man vera so at skilja, at hon er vorðin gift við honum, tí hann var ríkur. Men Birna er ráðarík („hon var ráðarík og prúð kona") (bls. 120), og hon fær sín vilja ígjøgnum, tá ið um ræður í stórmálum, serstakliga tá ið Sjúrður býður Tórhalli, at teir skulu hava búgvini í felag („Tórhallur verður nú skúgvaður til viks og lítið virdur, so at Sjúrður og Birna ráða nú øllum, sum tey vilja") (bls. 121). Tórhallur verður eisini hanreiur, og tá ið hann verður dripin á heldur illgrunaverdan hátt, giftast Birna og Sjúrður, og tey leggja búgv síni saman.

Søgan um Torberu og Geyta reyða er sera lík hesum. Tey løgdu eisini ástir saman, sjálvt um Torbera var gift, men síðan verður maðurin dripin á illgrunasaman hátt, og Torbera og Geyti giftast.

**Kvinnurnar eggja monnunum til**

Til samanburðar við ávísar íslendingasøgur kann verða nevnt, at har hava kvinnurnar leiklut, ið er rættiliga líkur tí hjá kvinnunum í Føroyingasøgu, men sigast má, at tær eru nakað sjónskari enn í Føroyingasøgu. Verður borið saman við kongasøgur, so hava kvinnurnar ein sera lítlan leiklut í hesum tekstslagi; tær eru nærum ósjónligar.

Kvinnurnar í íslendingasøgum stíga fram sum sterkar stoltar kvinnur, ið hava stóra ávirkan á hendingagongdina. Hetta sæst sera væl t.d. í Njáls søgu. Hóast kvinnurnar ikki sjálvar



hevna og drepa, so eru tær aftanfyri og eggja monnunum til, tá ið ættaræran skal verjast, og tá ið órættur skal hevnast. Kvinnurnar í Njáls søgu eggja monnunum til hevnd og dráp. Í einstøkum førum krevja tær blóðhevnd, sjálvt um menninir vilja krevja mannabøtur. Tað ber til at siga, at leikluturin hjá kvinnunum er at birta uppundir. Tær syrgja fyri, at ættaræran verður hildin í hevd.

Hetta sama síggja vit í Føroyingasøgu. Í fyrsta lagi tá ið Tróndur kemur til Tóru Sigmundsdóttur at bera upp bønarorð fyri Leiv. Hon er snarráðin og leggur treytir á, um hann vil hava hana til konu. Hann skal gera eið upp á, at hann ikki var faðir hennara at bana, og hann skal finna banamannin og hevna faðirdrápið. Síðan kunnu tey gera sættir sínámillum, sigur hon. Hon fær vilja sín, og á henda hátt fær hon faðir sín hevndan og giftist síðan við Leivi. Eisini ber til at siga, at hevði hon ikki verið so gløgg at giftst við Leivi, hevði ætt hennara kanska ikki at enda sigrað í ættarstríðnum, men verið tann minni menta. Í øðrum lagi tá ið Leivur Tórisson verður dripin. Her vilja møðgurnar Turið og Tóra hava hevnd, tær ganga á Leiv Øssursson og brigsla honum, at hann ikki hevur viljað hevnt skommina. Tær sýna honum illvilja og fíggindskap. Leivur letur hetta ikki við seg koma; hann hevur ógvuliga gott tol við teimum. Men hetta hjálpir einki, nú siga tær, at tol hansara kemur av, at hann er ein bloyta og letingur. Hesin ágangur á Leiv batnar ikki, fyrr enn Sigmundur talar við Turið í dreymi og biður tær vera blíðari við Leiv, tí hann mundi fara at megna at hevna



skommina. Tá blíðkast tær, men eyðsæð er, at „handan tjøldini“ hava kvinnurnar eina makt, ið tær nýta til fulnar.

Her sæst, at tað er skommin, ið er so ring at bera. Og skommin má verða hevnd, tí hon er ov tung hjá kvinnunum at bera. Hetta sæst eisini seinni, tá ið Sjúrður ber upp bønarorð fyri Turið. Her spyr hon dóttur sína til ráðs, og Tóra sigur, at ikki skal hon vísa hesum frá sær, um hon ræður, „um so er, at tygum er nakað í huga at royna at hevna ta skomm, sum okkum hevur verið gjørd, og ikki er annað betri agn enn hetta til at draga teir“ (bls. 132-133). Her sæst eisini, at Tóra leggur stóran dent á, at skommin má hevnast.

Skilligt er, at har ið tær týdningarmestu hendingarnar eru og týðandi avgerðirnar verða tiknar, t.e. á tingi, í bardaga, har eru kvinnurnar ikki við. Tað eru menninir, sum í høvuðsheitum stýra og ráða, - tað eru teir, ið sum heild eiga ognirnar og hava valdið. Kortini eru kvinnurnar ikki uttan ávirkan á hendingarnar. Tær gera seg galdandi á øðrvísi hátt, ávirka menninar, tá ið tær eru misnøgdar ella ynskja hevnd.

**Leikluturin hjá Ragnhild og Turið**

Ein avgerandi leiklut hava møðgurnar Ragnhild og Turið, tá ið Sigmundur og Tórir villast í fjøllunum í Noregi. Tað ber til at siga, at tær bjarga lívinum á teimum báðum, tí tá høvdu teir ligið úti mong samdøgur matleysir. Sigmundur strevar seg fram við tí fyrilagsta Tóri á bakinum, tá ið teir langt um leingi finna ein garð har í oyðuni. Tá eru møðgurnar einsamallar heima, tær taka sær av teimum, geva teimum turr klæði og geva teimum at eta. Húsbóndin Úlvur, ið seinni kemur heim, er ikki blíður um hetta, men Ragnhild sigur: „Ikki nenti eg ... at so vænir unglingar skulu doyggja her hjá húsum okkara“ (bls. 27). Tað eydnast síðan kvinnunum at sannføra Úlv um, at dreingirnir skulu sleppa at verða verandi um náttina. Úlvur sigur enntá: „Tað tykir mær, at konufólkini vilja, at tit skulu hvíla tykkum her í dag, um tit halda tað vera best“ (bls. 27). Og dagin eftir sigur hann, at teir kunnu sleppa at dvølja har um veturin, tí „Konufólkunum dámar tykkum væl, ...“ (bls. 27). Einki er at ivast í, at kvinnurnar hava allan heiðurin av, at Sigmundur og Tórir sleppa at dvølja har og sleppa undan at doyggja úti.

**Øðrvísi kvinnu- og kærleiksáskoðan**

Verður hugt at kvinnulýsingunum í síni heild, og hvønn týdning kvinnurnar hava í søguni, so sæst, at í seinnu helvt av Føroyingasøgu er kvinnan rættiliga virkin í hendingagongdini. Bera vit saman við fyrsta triðing av søguni, so verður kvinnan lýst nakað øðrvísi, tó at kvinnur í einum staði hava stóran týdning fyri hendingagongdina. Hesin partur av søguni er eyðkendur av ævintýramotivum, og hetta ávirkar eisini kvinnuuppfatanina.

Kvinnurnar eru fríðar í ásjón og umsorganarfullar, t.d. verður sagt um Ragnhild og Turið: „báðar vóru tær fríðar í ásjón“ (bls. 26). Tað ber til at siga, at kvinnuidealið í hesum partinum sýnir eina sera umsorganarfulla og lagaliga kvinnutýpu, ið stendur í sera stórum mótsetningi til kvinnuidealið í íslendingasøgum. Har er kvinnan ikki eftirlátlig og undirbrotlig. Kvinnuidealið í hesum partinum av Føroyingasøgu er sum sagt ævintýrakent, og tað minnir eisini um kristna kvinnuidealið, ið seinni kom úr Miðjarðarhavslondum við kristningini.

Her kunnu vit bera saman við seinna part av Føroyingasøgu, partin tá ið Tóra er vaksin. Hon er ikki vøkur, men hon er sjálvstøðug og ráðaklók. Vit hava her eina positiva lýsing av eini kvinnu, ið ikki er vøkur. Slíkar lýsingar eru ikki óvanligar í íslendingasøgum, ið eru realistiskar bókmentir. Sum móðir hennara, Turið, verður lýst í fyrsta parti av søguni, so stendur dóttirin í stórum mótsetningi til hennara.

Her kann verða nevnt, at í søguni verða kvinnur bert nevndar á 42 av teimum 142 blaðsíðunum (í týðing eftir Bjarna Niclasen) í mun til, at menn verða nevndir á hvørjari síðu. Tær verða sostatt bert umrøddar á sløkum triðingi av bókarsíðunum. So eyðsæð er, at kvinnurnar ikki standa fremst í søgugongdini, men hóast tað, so hava tær í støðum avgerandi týdning fyri hendingagongdina. Sum áður nevnt, verða Turið Sigmundseinkja og Tóra

Sigmundsdóttir lýstar sum sterkar og sjálvstøðugar. Umframt tær, Birnu, Torberu og Torgerð Hørðabrúður, so verða hinar kvinnurnar í bókini bert nevndar, tá ið tær verða umrøddar í eginleika sínum sum hjúnafelagar, frillur, døtur ella møður.

**Kallmannasamfelag**

Kvinnurnar í víkingatíð høvdu ikki ein rætt, sum tær beinleiðis kundu fáa fyrimun av. Bert tær kvinnur, ið høvdu eina sterka persónmensku og vóru av stórbærari ætt, kundu fáa stóra ávirkan. Men tær fríbornu kvinnurnar í søguøld høvdu meira vald og mæti, enn kvinnurnar fóru at fáa í nógvar øldir frameftir. Prísurin fyri hetta mæti var, at ættin avgjørdi giftarmálið fyri kvinnurnar. Giftarmálið varð fatað sum ein samgonga millum ættirnar. Her mátti kvinnan lúta, sjálvt um hon sjálv var ímóti giftuni. Tess hægri ein kvinna var í tign, tess meiri varð hon nýtt sum ein finna í maktspælinum hjá faðir, brøðrum ella synum. Ein einkja kundi festa seg sjálva, men var ein maður í ættini, so hevði hann til eina og hvørja tíð rætt til at taka ræðið yvir ognum hennara. So hóast kvinnurnar høvdu ávirkan, so var hetta eitt kallmannasamfelag út í æsir. Men Preben Meulengracht Sørensen, ið hevur granskað íslendingasøgur neyvliga, vísir á, at kvinnurnar í víkingatíð vóru ikki kúgaðar. Heldur ikki sjálvt um ættin skuldi avgera, hvønn húsbónda tann unga kvinnan skuldi hava. Hjúnabandið hoyrdi til viðurskiftini hjá ættini, tí tað hevði alstóran týdning fyri vælferðina hjá ættini, hvønn hon fekk til mann, og áhugamálini hjá kvinnuni vóru tey somu sum tey hjá ættini. Tað var at røkja áhugamál kvinnunnar at finna henni ein mann, ið var henni javnborin í tign og ætt, og sum hevði góðar eginleikar.

Týdning fekk kvinnan tó ikki, fyrr enn hon giftist. Tann ógifta kvinnan hevði lítlan týdning í samfelagnum, og í íslendingasøgum er hon rættiliga ósjónlig. Eftir lógini hevði unga ógifta kvinnan ongan avgerðarrætt í sambandi við giftarmál sítt, og einkjur høvdu bert avmarkaða ávirkan á, hvønn tær fingu til mann. Hetta sæst eisini aftur í íslendingasøgum, og har geldur tað eisini, at verður kvinna gift móti sínum vilja ella fær mann, ið ikki er henni javnborin, so gongur hjúnalagið illa.

Her kunnu vit bera saman við Føroyingasøgu, har ið Tóra Sigmundsdóttir sjálv avger, um hon vil hava Leiv Øssursson og sjálv setur treytirnar fyri hesum hjúnalagi. Hetta sýnir eina sera sjálvstøðuga unga kvinnu, tí eftir røttum skuldi tað verið elsti maður í ættini, ið tók eina slíka avgerð. Eisini Turið megineinkja sýnist sera klók og sjálvstøðug, ikki minst tá ið hon leggur ráð saman við dóttrini at látast vilja giftast við Sjúrði, men hetta er bert ráðagerð at fáa hevnt Sigmund, mann sín. Her má sigast, at tað er Tóra, ið er tann, ið løðir.





*Myndirnar eru av áseymaðum veggtjaldi við brotum úr Føroyingasøgu. Tað eru systrarnar Petra (1904-1990) og Beata Petersen (1911-1991) úr Koytu á Sandi, ið hava seymað. Arthur Waag, lækni, átti veggtjaldið. Hann læt Skanderborg Museum tjaldið, ið læt Føroya Fornminnissavni tað í 1994. Tjaldið hongur nú í framsýningini í Brekkutúni í Hoyvík. (Myndir: Haldane Joensen)*

Tróndur var tann, ið fekk giftuna millum Leiv og Tóru í lag. Tað varð gjørt til at fáa sættir („hetta tókti honum líkligast til heilar sættir“) (bls. 96) millum eftirkomarar Sigmunds og eftirkomarar Havgríms. Í íslendingasøgum síggja vit hetta fyribrigdið, men eisini í samtíðarsøgum. Tær ættir, ið áður hava verið í stríði hvør við aðra, gifta ung fólk úr báðum ættunum til at fáa sættir. Sostatt verður giftarmál nýtt í einum væl avráddum spæli til at fáa ættir at semjast og til at styrkja teirra vald og mæti.

**Skaldslig eyðkenni**

Tey, ið hava granskað Føroyingasøgu, hava bitið merki í, at umframt at fyrsti triðingur av søguni - tíðin tá ið Sigmundur og Tórir eru hjá húskinum í fjøllunum í Noregi - lýsir eitt meiri ævintýrakent kvinnuideal enn í restini av søguni, so hevur hesin partur eisini aðrar ábendingar um ævintýramotiv. Eitt nú eru fleiri „blind motiv“, t.e. motiv, ið høvdundurin kennir, men ikki nýtir til fulnar. Hetta bendir eisini á, at høvundurin hevur havt stóran kunnleika til munnliga hevd av ymsum slag, eitt nú ævintýr. Ævintýr og aðrar munnligar frásagnir byggja á heilt aðra hevd enn restin av Føroyingasøgu, men kortini eru brot úr slíkum frásøgnum vorðin flættað uppí. Tá ið Sigmundur og Tórir finna húskið í fjøllunum, ið livir í einingi, so er hetta eitt týpiskt ævintýramotiv. Her gera heilt onnur fyribrigdi seg galdandi enn í íslendingasøgum; her verður talað um kenslur, og her finst ein heilt øðrvísi kvinnu- og kærleiksáskoðan. Tann væna dóttirin, Turið, og Sigmundur fáa tokka hvørt til annað. Tá ið Sigmundur hevur avgjørt at fara haðani, verður kærleiki eisini nevndur. Fosturfaðirin nevnir, at hann leingi hevur vitað, at ástartokki er teirra millum. At talað verður um kenslur, bendir á ævintýramotiv. Hetta er eisini ólíkt íslendingasøgum, tí har verður orðið „ást“ sera sjáldan nevnt, men er hetta vanligari í riddara- og fornaldarsøgum. Møguliga ber Føroyingasøga eisini merki av hesum tekstsløgum. Annað, ið bendir á ævintýramotiv, er tað eydnuríka giftarmálið millum Torkil og Ragnhild. Her er tað fátækur maður og rík kvinna, ið gerast góð. Í íslendingasøgum hevði eitt slíkt hjúnalag ikki eydnast, tí tey vóru ikki javnborin.

Fyrsti triðingur av Føroyingasøgu byggir fyri ein stóran part á ferðafrásagnir, ið høvundurin hevur kent. Parturin um Torkil Turrafrost verður hildin at hava tilfar úr einum slag av útiløgumannasøgum; hetta eru søgur um menn, ið eru dømdir friðleysir; tær hava ofta ein duldarfullan og romantiskan dám. Risakendi skógar-



búgvin Úlvur, ið er styggligur, og sum bert við tevi sínum varnast gestirnar, gevur eisini ábendingar um ævintýramotiv. Tekstslagið útiløgumannasøgur er at finna í fleiri íslendskum fornsøgum og er eisini kent í yngru íslendskum sagnum, og í føroyskum fólkaminni eru spor at finna eftir slíkar søgur, t.d. søgnin um Snæbjørn.

**At taka samanum**

Sum nevnt so eru fornsøgur, serstakliga íslendingasøgur, skaldskapur, sum sigur frá hendingum, ið eru farnar fram tvær, tríggjar ella fýra øldir áðrenn, at tær eru niðurskrivaðar. Og eyðsæð er, at høvundarnir hava verið ávirkaðir av síni egnu tíð og umhvørvi og sjálvsagt eisini av tí bókmentaliga ráki, ið hevur verið frammi tá. Siga hesar søgur so okkum nakað um veruligu kvinnurnar, ið livdu í víkingatíð? Eitt, ið bendir á, at neyvt samband er millum søgukvinnurnar og veruleikan tá, er, at søgurnar siga frá eini kvinnutýpu, sum víkur frá tí kristna kvinnunorminum. Henda kvinnutýpa má hava røtur í heidnari tíð, annaðhvørt hon er íblást av hevd ella av teimum kvinnum, sum livdu í Íslandi í egnu tíð søguhøvundanna.

Kvinnuidealið, ið vit kenna frá nútíðini, er merkt av eini kvinnuáskoðan, ið kom til Norðurlond frá Miðjarðarhavslondum við kristningini, og hetta kvinnuideal stendur í sterkum mótsetningi til kvinnuna í víkingatíð. Kvinnuidealið, ið vit finna í fyrsta triðingi í Føroyingasøgu, er sera ólíkt kvinnuidealinum í restini av søguni, har tað er líkt kvinnum í íslendingasøgum. Hetta fata bókmentafrøðingar sum ábending á, at meginparturin av fyrsta triðingi er settur afturat seinni, t.e. líkt er til, at annar høvundur (ella aðrir høvundar) hevur sett henda part afturat, eftir at søgan er frumritað; møguliga er økt munandi um upprunaligu søguna við at flætta inn ymiskar ferðafrásagnir og ævintýramotiv fyri at geva søguni meiri rúmd (amplificatio).

Tá ið samanum verður tikið, má sigast, at kvinnulýsingarnar eru av sera ymisligum uppruna; tær eru lutvíst líkar lýsingunum í íslendingasøgum og lutvíst ævintýrakendar. Tískil ber til at siga, at kvinnulýsingarnar eru mótsagnarkendar, tí tær byggja á hvør sína hevd. Føroyingasøga sum heild hevur heldur ikki einfaldan uppruna. Hon kann hvørki flokkast sum íslendingasøga ella sum kongasøga. Hon ber eyðsæð merki av tí umhvørvi, ið hon er skrivað í, og hon er týðiliga ávirkað av munnligum frásøgnum - ævintýrum, sagnum, útiløgumannasøgum, víkingasøgum - og skrivligum keldum sum norrønum kongasøgum og týddum søgum.

Alt hetta bendir á, at Føroyingasøga hevur eina samansetta skapanarsøgu, ið møguliga røkkur um eitt longri tíðarskeiði. Tískil má sigast, at yvirbráið í søguni sum heild er sera ymisligt, og tað hevur eisini ávirkan á kvinnulýsingarnar.

**Heimildir:**


Almqvist, Bo. 1988. Some Folklore Motifs in Færeyinga saga. Saga og kirkja. Sögufélag. Reykjavík

Almqvist, Bo. 1992. Färingasagan. 1992. (Inngangur) bls. 7-69. Gidlunds Bokförlag. Södertalje

Brennu-Njáls saga. 1954. (Ritstj. Einar Ólafur Sveinsson) Íslenzk fornrit XII. Hið Íslenzka fornritafélag. Reykjavík (endurprentað 1971)

Føroyinga søga. 1995. Bjarni Niclasen týddi. Føroya Skúlabókagrunnur. Tórshavn

Halldórsson, Ólafur. 1978. Færinga saga. Íslensk úrvalsrit 13. (Inngangur) bls. 5-51. Iðunn. Reykjavík

Hendriksen, Vera. 1982. Skjebneveven. Grøndahl. Oslo

Hendriksen, Vera. 1981. Sagaens kvinner. Grøndahl. Oslo

Íslensk bókmenntasaga II. 1992. (Ritstj. Vésteinn Ólason). Mál og menning. Reykjavík

Matras, Chr. 1927 "Føroyingasøga" í nýggjari útgávu. Varðin 7. bd. Bókagarður. Tórshavn

Poulsen, J.H.W. 1985 Fólkanøvn í Føroyum. Studia anthroponymica Scandinavica 3. bd. Swedish Science Press. Uppsala

Sørensen, Preben M. 1992: Fortælling og ære. Aarhus Universitetsforlag. Århus


**Óprentaðar heimildir:**


Simonsen, Marjun Arge. 1998. Føroyingasøga sum tekstslag, lýst gjøgnum høvuðseyðkenni, serstakliga kvinnulýsingarnar. Frí heimauppgáva í norrønum. Føroyamálsdeildin.


Øll endurgeving er úr týðing Bjarna Niclasens *Føroyinga søga*. Tórshavn 1995


**MARJUN ARGE SIMONSEN**

er útbúgvin BA í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum. Hon arbeiðir sjálvstøðugt við rættlestri, týðing, teksttillaging, terminologiskum og leksikografiskum uppgávum.

Teldupostur: marjuns@kallnet.fo

# Chaetopter bustmaðk

*Maðkar eru millum lægst mettu dýrini í heiminum, men gevur tú sær stundir at hyggja nærri at teimum, varnast tú skjótt, at maðkar eru áhugaverdari enn so. Tað er heilt vist, at ein maðkur er ikki bara ein maðkur. Í heiminum eru fleiri túsund sløg av møðkum, og teir eru allir serstakir. Teir kunnu t.d. vera sera litfagrir, og teir hava allir hvør sítt lívsmynstur.*

Maðkurin, ið greiðast skal frá her, er ein heilt serstakur maðkur. Við fyrsta egnabrá er tað serliga skapið, tú varnast. Liturin á kalldýrinum er mjólkarhvítur, og á kvenndýrinum er liturin reyðgulur. Maðkurin skilur út úr sær serstøk evni úr einstøkum kyknum í kroppinum, sum kunnu tykjast sjálvlýsandi. Longdin á maðkinum er vanliga uml. 15 cm.

Á sumri 2003 varð farið undir at leita eftir hesum bustmaðki á Kollafirði. Við tríhyrningsdreggi eydnaðist tað okkum at savna uml. 40 rør við *Chaetopterus*-maðkinum innaní. Hetta er óivað tann størsta nøgdin av hesum bustmaðkaslagi, ið er innsavnað í Føroyum. Viðmerkjast skal tó, at hetta bustmaðkaslag ikki bert er staðfest á Kollafirði, men eisini er funnið á Skálafjørðinum og aðrastaðni.

**Kroppurin**

Kroppurin er í trimum pørtum, framkroppur, miðkroppur og bakkroppur.

***Framkroppurin*** hevur oftast 13 liðir. Fremsti liðurin, har eyguni sita, verður nevndur prostomium. Síðan kemur peristomiið, har muðurin situr. Aftan fyri hetta eru oftast 9 ella 11 liðir við bustum, men tað kunna tó vera færri ella fleiri. Ein av 3., 4. ella 5. bustliði hevur altíð grovar bustir, sum kunnu hava ljósabrúnan til heilt myrkabrúnan lit.

**Miðkroppurin** hevur altíð fimm liðir. Tey ovaru bustfestini á fyrsta liði eru stór og lík veingjum. Við teimum ger bustmaðkurin slím-



us-
ar

## – Eitt tað mest sermerkta bustmaðkaslagið á okkara leiðum




JÓGVAN FRÓÐI HANSEN
HAVLÍVFRØÐILIGA ROYNDARSTØÐIN



## Bólking

Eitt av teimum størstu fylkjunum í dýraheiminum eru liðmaðkar (Annelida). Undir teimum eru tríggir stórir flokkar, maðkar (Oligochaeta), bustmaðkar (Polychaeta) og iglar (Hirudinea), tó eru eisini nakrir smærri flokkar. Maðkarnir liva bæði í sjógvi, í vatni og á landi. Tann kendasti av teimum er óivað reyðmaðkur, men tó eru aðrir í sama flokki, sum eru minst líka vanligir. Iglar eru bæði í vatni og sjógvi og á landi. Teir liva allir sum blóðiglar.

Bustmaðkar umboða tann størsta av hesum flokkum. Næstan øll sløgini í hesum flokki liva í sjónum. Sjálvt um hetta er ein av teimum størstu dýraflokkunum, vit hava í Føroyum, eru teir tó ikki serliga kendir millum fólk, og bert fáir hava føroyskt navn t.d. grunnmús *(Aphrodite aculeata)* og fjørumaðkur *(Arenicola marina)*. *Chaetopterus*-maðkar eru eisini bustmaðkar, men teir hava tó einki føroyskt navn. Á enskum verður hann kallaður "parchment worm" (t.e. "pergamentormur"); navnið kemur av tí seiga búrørinum.




*Chaetopterus bustmaðkur inni í búrørinum. Maðkurin fangar bitlar í netinum, sum hann hevur gjørt sær. Vatnstreymurin er frá høgru til vinstru*

netið. Á baksíðuni á sama liði situr ein soguskál, sum dýrið heldur sær fast í rørveggin við. Næsti liðurin er tann longsti á øllum kroppinum, hann er umleið líka langur sum allur framkroppurin. Á hesum sama liði er magin, sum er grønur á liti. Eisini er gagnið her, sum rullar slímnetið saman, og soguskálin er á baksíðuni. Triði, fjórði og fimti liður á miðkroppinum hava allir sama leiklut. Hesir liðirnir eru viftuformaðir, og við teirra vifturørslum skapa teir vatnstreym gjøgnum rørið. Hesar rørslur hava tvær høvuðsuppgávur, at fylla slímnetið við lívrunnum tilfari frá gjøgnumstreymandi sjónum, ið maðkurin síðan etur, og at veita súrevnisríkan sjógv gjøgnum rørið. Hesir tríggir liðirnir hava eisini soguskálir á baksíðuni.



## Grovar bustir

Tær grovu bustirnar sita næstan altíð á 4. bustliði, men tær kunnu eisini sita á 3. og/ella 5. Sum áður nevnt kann liturin skifta frá bust til bust. Á hesi myndini eru tær flestu myrkabrúnar, men nakrar eru ljósari brúnar. Hesar bustirnar eru sera harðar og verða brúktar til at skera í rørið, tá ið tað skal gerast størri.

***Bakkroppurin*** kann hava heilt nógvar liðir. Teir eru næstan allir eins. Tann fremsti er størstur, og gerast teir smærri móti bakendanum. Liðirnir á bakkroppinum innihalda kynsgøgn. Eisini eru kyknur á hesum liðum, sum lata frá sær slím, ið fer til at byggja rørið við. Aftasti liður verður kallaður pygydium, og her situr gotið.

### Lívlendi og rørið

Teir flestu maðkarnir á Kollafirði vórðu fingnir á uml. 17 metra dýpi. Botntilfarið var sum oftast fínur sandur við nakað av smásteinum í.

Rørini, sum hesir maðkar búgva í, eru ymisk alt eftir, hvat slag av maðki tað er. Rørið, ið *Chaetopterus valencinii* ger sær, kann verða upp til 40 cm langt, og skapið kann skifta. Nøkur eru næstan heilt bein, nøkur U-skapað, men tey flestu hava bananskap. Rørið, sum er av slími, er seigt í tí. Seigari enn onnur sløg av *Chaetopterus*-búrørum.

Helst er ein partur av rørinum niðurgrivin, men restin er omaná, tí rørini eru fjald av fínum sandi, og dýr liva á rørinum, sum krevja beinleiðis samband við sjógv, t.d. oðulingur. Við at hyggja at, hvar onnur dýr liva á rørinum, fáa vit varhugan av, at mittasti partur av rørinum oftast er grivin nakað niður. Tað tykist, sum skapið á búrørinum er knýtt at, hvussu botnurin er skikkaður.

### Føðsluvanar

*Chaetopterus*-maðkarnir eru sera væl tillagaðir at liva inni í rørinum. Serliga er føðsluhátturin áhugaverdur.

Hann liggur so at siga á bakinum inni í rørinum. Við soguskálum festir hann seg til veggin. Teir longu slímveingirnir á fyrsta liði á miðkroppinum verða breiddir út, so teir fylla tað mesta av ummálinum á rørinum. Frá innaru síðu á hesum veingjum verður slím skilt út. Slímið verður flutt oman eftir kroppinum í eini foyru av bivhárum til eitt gagn, sum heldur fast í niðasta partin av slímhópinum. Á henda hátt fær slímið skap sum eitt net.

Teir tríggir síðstu liðirnir á miðkroppinum eru mest líkir viftum, og leiklutur teirra er júst eisini at virka sum viftur. Tá vifturnar verða nýttar, gera tær ein vatnstreym, sum oftast gongur frammanífrá og aftureftir gjøgnum rørið. Á henda hátt verður føðsluríkur sjógvur pumpaður gjøgnum rørið, og bitlar av føði verða fangaðir í slímnetinum. Áðurnevnda gagnið rullar slímið upp til ein rundan bólt, og tá ið bólturin hevur eina hóskandi stødd, verður hann fluttur upp til munnin og svølgdur. Henda gongdin verður endurtikin fleiri ferðir um samdøgrið. Føðin hjá *Chaetopterus* er fyri tað mesta kisilalgur, men eisini annað æti og egg og ormverur frá øðrum dýrum verða etin.




Inni í rørinum saman við *Chaetopterus*-maðkinum eru ofta onnur dýr. Oftast eru tað smáir krabbar ella roðslumaðkar. Í Føroyum kemur tað neyvan fyri, at krabbar eru í rørinum, men roðslumaðkar eru vanligir, tó einans ein í hvørjum røri. Oftast er tað tað eina og sama slagið, ið er í rørinum. Helst livir hesin "gesturin" av bitlum, sum *Chaetopterus*-maðkurin stoytir frá sær, oftast tí teir eru ov stórir. Hesir roðslumaðkarnir, sum eisini eru bustmaðkar, verða upp til 5 cm langir.

Myndin til høgru er av sama slagi av roðslumaðki, sum á myndini omanfyri. Til vinstru sæst høvdið, har tvinni eygu sita. Øll yvirsíðan er fjald av skrubb.



*Roðslumaðkurin Gattyana Cirrosa er tann vanligasti sambúgvin hjá C. valencinii*

## *Chaetopterus*-rørið sum lívlendi



*Øðulingur á Cheatopterus-røri*



*Bustmaðkur av Phyllodocidae-ættini millum storknaðu slímløgini*

Á rørinum og millum tey storknaðu slímløgini er eitt lívlendi hjá fleiri dýrum. T.d. kunna vit finna øðulingar *(Musculus niger)*, rundormar (Nematoda) og ymisk sløg av bustmaðkum.

**Navnatrupulleiki**

Chaetopterus valencinii, sum helst er rætta navnið á maðkinum, ið fingin er á Kollafirði, er úr ættini Chaetopteridae, sum hevur 5 slektir, men av hesum eru bert 2 slektir við vissu staðfestar í Føroyum, nevnliga Chaetopterus og Mesochaetopterus.

Chaetopterus er slektin, ið hevur flest sløg av teimum fimm slektunum. Fyrst í 1870-árunum vóru til samans 9 evropeisk sløg av hesi slektini lýst. Men um ár 1900 vórðu øll hesi sløgini, saman við øðrum sløgum úr øðrum heimspørtum, lýst sum tað eina og sama slagið, nevnliga *C. variopedatus*. Tá varð hildið, at útsjóndin á hesum maðki skifti frá staði til stað. Men hesi seinastu árini hevur aftur verið skilt ímillum sløgini. Navnið á maðkunum, sum varð funnin á Kollafirði, er helst *C. valencinii*, og hetta slagið varð fyri fyrstu ferð navngivið í 1864 eftir einum maðki, sum varð fingin við strondina fram við Normandínum. Í løtuni verður arbeitt við at endurskoða hesa slektina, so helst verða minst 10 ymisk sløg av Chaetopterus í Evropa.

*Jógvan Fróði Hansen hevur tikið myndirnar og teknað tekningarnar.*

**Jógvan Fróði Hansen**

er stakgreinalesandi í lívfrøði á Fróðskaparsetrinum, og hann hevur síðan 2002 starvast við at navngreina dýr á Havlívfrøðiligu roydarstøðini.

Teldupostur: jfh@havbotnur.fo

# Dustlús

## Ein greinarøð um skaðadjór



DORETE BLOCH
FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN



*Dustlús*
Copeognatha
*Mynd: Astrid Andreasen*

**Hvussu sær dustlús út?**
Dustlús er eitt lítið skordýr, ið hvørki er ein lús ella livir mest í dusti. Dustlús kann ikki flúgva, men afturímóti hoppar hon sum eina loppa. Harumframt er dustlús ikki eitt sermerkt djór, men ein undirhópur (Copeognatha) við uml. 50 ymiskum djórasløgum, harav tey fimm kunnu liva inni í húsum.

Dustlús er nær skyld við frumkendar skordýrahópar sum kakkulakkar, termittar, fjaðurlýs og eisini tær røttu lýsnar.

Ein dustlús er 1-2 mm long og hevur ongar veingir ella bara heilt evarska lítlar veingir, ið hon ikki kann flúgva við. Eyguni eru stór og standa út úr tí stóra høvdinum, og for- og bakkroppur eru tvíbýttir við 8-10 liðum. Ein dustlús er ljósagrá ella brúnlig á liti, og hon skyggir, tá ið hugt verður at henni.[4]

**Dustlús er fjórðvanligasta skaðadjórið**
Dustlýs skulu hava tað myrkt og slavið. Oftast fær Føroya Náttúrugripasavn dustlýs í einum pakka við mjøli eller havragrýni, og kann hann yðja av dustlúsum, bæði inni í og uttan á pakkanum. Tað vísir, at tað hevur verið ov slavið, har pakkin hevur staðið, annaðhvørt heima við hús ella í tí handlinum, har pakkin er keyptur. Tað kann vera ringt at halda eina vørugoymslu nóg turra og kalda, so eingi skaðadjór koma fyri við hvørt. Eisini kunnu skaðadjórini verða komin við pakkanum úr útlondunum og á tann hátt hava spjatt seg til vørugoymsluna og víðari til húsini.

Dustlús sæst eisini í nýbygdum húsum, har beton og træ ikki enn er heilt tornað. Hon livir mest av blámusoppum, ið grógva á slavnum útveggjum, innbúgvi og handilsvørum. Har miðstøðuhiti er í húsunum, kann hvørki dustlús ella blámusoppur liva, tí tey torna upp.

Dustlúsin er fjórðvanligasta fraboðaða skaðadjórið, og sæst hon javnan gjøgnum árið,[3] sum sæst á stabbamyndini á næstu síðu.

Eitt annað slag av dustlús er bóklúsin, ið livir av blámusoppum og lími í gomlum bókum. Um bókhillin stendur aftur at einum útveggi, gerst tað slavið, og har trívst bóklúsin væl. Her eru tvey sløg av bóklúsum, og tey líkjast eitt sindur dustlúsini.

**Um dustlús**

Mótsett fýri[2] og avstralskari tjóvaklukku[1] hevur dustlúsin eina einfalda umskapan, t.e. hon veksur frá eggi → eina lítla ókynsbúna klukku → eina eitt sindur størri ókynsbúna klukku → kynsbúna klukku, ið makast og aftaná víggjar uml. 100 egg. Tær smáu ókynsbúnu klukkurnar á nymfustigi eru minni og eisini minni litfagrar enn tær vaksnu. Eggini verða víggjað alt árið, um tað er nóg heitt og slavið, og oftast í einum spuna, har eisini tær nýklaktu dustlýsnar kunnu fjala seg. Frá eggi tekur tað umleið ein mánað, til dustlúsin er kynsbúgvin.

Nakrar dustlýs hava eins og til dømis meyrur og býflugur moyarføðing *(parthenogenesis)*, har ungarnir búnast úr eggunum, uttan at dustlúsin hevur makast.[4]

**Hvussu stóran ampa elvir dustlús til?**

Dustlús ger ongan skaða, bítur ikki sum rættilig lús og er ikki vandamikil fyri heilsuna, men ikki er tað tespiligt at opna eina mjølpakka ella eina bók, ið ýður í dustlúsum.

**Hvussu verður dustlús bast?**

Dústlús tolir ikki kulda ella turt umhvørvi. Finnur ein nógvar dustlýs til dømis í eini bók, ber til at frysta bókina og samstundis syrgja fyri, at tað verður turrari, har bókhillin stendur. Í húsum er tað átrokandi at lufta væl út og samstundis fáa turkað tey rúmini, har luftin er ov slavin. Tað hjálpir lítið at spræna eiturevni fyri at basa dustlúsini. Tað er altíð betri at dustsúgva heldur enn at vaska fyri at súgva skaðadjórini upp og harvið ikki geva teimum meira vætu, so tey nørast.


**Bókmentir**

1 Bloch, D. 2003. Føroysk skaðadjór 1. Avstralsk tjóvaklukka. Frøði 2/2003: 28-29.

2 Bloch, D. 2004. Føroysk skaðadjór. 2. Fýrur. Frøði 1/2004: 28-30.

3 Bloch, D. and Mourier, H. 1994. Pests recorded in the Faroe Islands, 1986-1992. Fróðskaparrit 41 (1993): 69-82.

4 Mourier, H. 1995. Husets skadedyr. G.E.C. Gads Forlag. København


Fjórða skaðadjórið, røtt verður um, er Staraloppa, *Ceratoplyllus sp.*


**DORETE BLOCH**

tók náttúruvísindaligt embætisprógv í djórafrøði við serligum atliti at vistfrøði antarfuglanna 1970 við Aarhus Universitet. Hon gjørdist fyristøðari á Djóradeildini á Náttúrugripasavninum í 1980 og stjóri á Náttúrugripasavninum í 1997. Í 1994 fekk hon doktaraheitið fil.dr. í djóravistfrøði við grindahvalum sum evni við Lunds Universitet. Dorete hevur harumframt síðan 1974 verið lektari í lívfrøði á Fróðskaparsetri Føroya, og í 2001 fekk hon professaratign á sama stovni.

Teldupostur: doreteb@ngs.fo





*Myndin sýnir fráboðanir um dustlýs í einum ári*

Úr innihaldinum í Frøði 1/2005

# Mølheyggjar á Sandi



Mølheyggjar eru bert einastaðni í Føroyum, nevnliga á Sandi. Mølheyggjarnir eru vorðnir til í einum samspæli ímillum plantuvøkstur og sand, ið verður førdur á staðið við vindinum, og úrslitið er, at eitt heilt serstakt plantusamfelag sæst her. Anna Maria Fosaa á Náttúrugripasavninum skrivar.

# Heimadoktarar

Nógvar søgur eru um heimadoktarar í eldri tíðum, sum hava verið høgt mettir fyri gott hegni og góðan vilja at hjálpa. Hvaðan høvdu hesi fólk sínar kunnleikar, og hvussu vóru viðurskiftini millum tey og teir røttu læknarnar? Í greinini verða nøkur dømi givin um heimadoktarar í 1800- og 1900-árunum. Elin Súsanna Jacobsen á Søgu- og samfelagsdeildini skrivar.

# Hitin á landgrunninum sett nýtt met



Síðan 1991 hevur Fiskirannsóknarstovan mátað hitan í sjónum við Oyrargjógv. Í 2003 vístu hesar mátingar, at hitin í sjónum var óvanliga høgur, og hitamet varð sett fyri fleiri mánaðir í 2003. Í greinini verður eisini greitt frá hitalagnum á landgrunninum, og hvussu tað broytist gjøgnum árið og yvir longri tíðarskeið. Karin Margretha H. Larsen á Fiskirannsóknarstovuni skrivar.